# Sáttmálarnir eru ov

**SÁTTMÁLASTRÍÐ** Hóast tað hevur gingið væl at fiska og selja hjá skipunum, sum Mikkjal Hammer er reiðari á, er hann sannførdur um, at tað liggur ov lítið eftir hjá skipunum. – Okkurt má gerast, áðrenn tað gongur galið hjá øllum flotanum, sigur reiðarin í Hvalba



Vilmund Jacobsen

Nú tað stendur á gomlum nøglum millum reiðarar og fiskimenn, og semingsstovnurin í dag byrjar at royna at finna semju millum partarnar um nýggjan sáttmála, hevur Mikkjal Hammer, sum bæði er reiðari og hevur ført skip ein stóran part av sínum lívi, hug til at geva sína meining um sáttmálaviðurskifti til kennar.

– Hóast tað hevur gingið væl hjá nøkrum ísfiskaskipum at fiska og selja í farna ári, liggur kortini lítið eftir hjá teimum, sum eiga og skulu reka hesi skipini.

## Býtið broytast

Mikkjal Hammer er onga løtu í iva um, at sáttmálarnir hjá manningunum í síni heild eru ov høgir, og at ov lítil partur av veiðivirðinum liggur eftir hjá skipunum.

– Tað eru altíð nøkur skip, sum fáa tað at bera til, men vit noyðast sjálvandi at hyggja eftir heildini. Eingin ivi er í mínari verð um, at býtið millum tað, sum skipini eiga eftir og tað, sum manningin eigur eftir, ikki kann halda fram sum er. Sáttmálarnir mugu lækkast nakað – ella eisini mugu viðurskifti broytast sum gera, at býtið partanna millum hongur betri saman.

Mikkjal Hammer heldur ikki, at tað í longdini fer at bera til, at inntøkur hjá fiskimonnum umborð á eitt nú lemmatrolarum liggja um einar 600.000-700.000 krónur um árið, samstundis sum skipini, sum hesir menn sigla við, hava trupult við at fáa endarnar at røkka.

– Hýruprosentini eru ov høg, og oljan fer avstað við



*- Tað er neyðugt, at sáttmálarnir millum reiðarar og fiskimenn verða reguleraðir nú, sigur Mikkjal Hammer, reiðari og skipari*

einum alt ov stórum parti av tí, sum skuldi ligið eftir hjá skipinum.

Hann vísir á, at bunkringarprísurin nú liggur oman fyri 4 krónur fyri liturin.

## Gongur galið

Reiðarin og skiparin sigur, at hendir einki, sum javnar býtið millum skip og fiskimenn nú, fer tað skjótt ikki at loysa seg at loysa skipini.

– Tá tað kemur har til, at hvør túrur gevur hall, tí ójavni er í býtinum av veiðivirðinum, verður allur fiskiflotin lagdur, og tá er einki vunnið hjá nøkrum.

Mikkjal Hammer heldur tað ikki vera skilagott fyri nakran av pørtunum at bíða, til tað hendir.

– Tá tað ikki loysir seg at lata skipini fara til fiskiskap, hava fiskimenn heldur onga hýru, og tað kann ikki vera meiningin. Tí er neyðugt, at sáttmálarnir millum reiðarar og fiskimenn verða reguleraðir nú, sigur reiðarin og skiparin í Hvalba, Mikkjal Hammer.

vilmund@sosialurin.fo

# Álvarsamt at flotin møguliga

**SÁTTMÁLASTRÍÐ** Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, tekur ikki dagar ímillum stríðandi partarnar, nú semingsstovnurin fer at royna at finna semju millum reiðarar og fiskimenn, men hann ásannar, at tað er álvarsamt, nú nógv bendir á, at fiskiflotin kanska verður lagdur í komandi viku

Vilmund Jacobsen

Sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fylgir Jacob Vestergaard sjálvsagt gongdini, nú nógv bendir á, at rættiligt stríð hevur tikið seg upp millum reiðarar og fiskimenn um nýggjan sáttmála.

Í dag byrjar semingin millum partarnar og sambært ætlanini, sum er løgd, skal ein semja helst verða undir landi á middegi týsdagin komandi.



*- Eg dugi væl at síggja, at neyðugt er við eini "balansugongd", soleiðis at bæði fiskimenn og reiðarar fáa tað burtur úr, sum er neyðugt, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum*

Tá má røkka ella støkka, sum tikið hevur verið til.

## Trupult at meta

– Tað er trupult at meta um, hvussu semingin fer at roynast, men tað letur til, at trupult verður at koma undir land við einum nýggjum sáttmála. Reiðarar tykjast vilja hava broytingar, men í løtuni er sjálvsagt ógjørligt at siga, hvussu hart partarnir fara at koyra tað.

Jacob Vestergaard ásannar, at eitt møguligt verkfall í okkara fiskiskipavinnu er sera álvarsamt.

– Tað er sjálvandi ein álvarsom støða, tá verkfall er í eini so stórari høvuðsvinnu, sum okkara fiskivinna er, og tí er at vóna, at partarnir – so ella so – finna fram til semju.

Sum landsstýrismaður, sum varðar av fiskiskipavinnu, sigur hann seg vóna, at báðir partar – reiðarar og fiskimenn – skilja álvaran í støðuni og hugsa seg væl um, áðrenn fiskiskipaflotin við verkfalli ella verkbanni verður lagdur.

– Jú, víst vóni eg, at fiskiskipavinnan og harvið fiskaarbeiði á landi – sum eru "motorurin" í okkara samfelag - ikki steðga upp, tí partarnir til tjúgund og seinast ikki kunnu semjast.

Sjálvur vil landsstýrismaðurin ikki taka dagar ímillum stríðandi partarnar, men hann dugir at síggja, at rættiliga ymiskt er, hvussu fiskiskipavinnan er fyri.

– Tað eru menn, sum vinna nógvan pening í ávísum veiðum, og so er tað skip, har manningin tjenar lutfalsliga lítið, og tí er eisini trupult hjá reiðaríum at manna hesi skip, sigur Jacob Vestergaard.

## Balansugongd

Landsstýrismaðurin sigur seg væl skilja, at bygnaðar-